# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 26. mai 2015, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Durita á Heygum, Herit Magnussen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, , og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 137**
Tilmælið frá borgarstjóranum um ársroknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014.
J.nr. 00.00.00-S08-1-14

Mælt verður bygdarráðnum til at góðkenna ársroknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014.

**Viðv. 137**
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna árssoknskapin fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014.

**Mál 138**
Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um, at nýggj autoklava verður keypt fyri kr. 75.000, og at upphæddin verður játtað á endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015.
J.nr. 83.01.04-G01-1-15

Tann 21. mai 2015 kom fráboðan frá Eyðbjørn Joensen, tannlækna, um, at autoklavan (ovnurin sum steriliserar øll tól) er gingin fyri. Autoklavan er 20 ára gomul.
El-Net hava roynt at umvælt ovnin, men niðurstøðan er, at tað skulu brúkast eykalutir fyri í minsta lagi kr. 10.000 fyri at fáa hana í lagi aftur, og tá kemur hon einans at halda í fá ár.
Ein nýggj autoklava kostar umleið kr. 75.000.

Undirritaði og Eyðbjørn Joensen, tannlækni, heita á bygdarráðið um at játta, at nýggj autoklava verður keypt fyri kr. 75.000, og at upphæddin verður játtað á endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015.

**Viðv. 138**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Malan Stórá

Durita á Heygum John Zachariassen